**Vegleiðing um limatreytirnar í Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya (BLF)**

Fyri at kunna gerast limur í BLF, skal ein fyrst uppfylla limatreytirnar í viðtøkunum hjá BLF. Síðani skal ein hava eina útbúgving, sum liggur innan sáttmálaøkið hjá BLF. Sáttmálaøkið er niðurfelt í sáttmála millum BLF og Fíggjarmálaráðið (FMR).

Tað krevst, at ein sum minstakrav hevur ein akademiskan bachelor, ella ein HD 2. part. HD 2. partur er javnsettur við ein akademiskan bachelor. CBS skrivar um tann samalaða HD (tvs. um man hevur bæði HD 1. og 2. part): *"Den samlede HD uddannelse er en uddannelse på bachelorniveau [...]"*

<u>Viðtøkurnar hjá BLF siga:</u>

"**Limaskapur**

*§ 3. Limaskap fáa fólk, sum hava akademiskt bachelorprógv, kandidatsprógv, licentiatsprógv, Ph.d ella doktaraheiti, sum í minsta lagi telur 180 ECTS-stig, tó í minsta lagi 120 ECTS-stig fyri tey, ið hava HD 2. part, og sum í høvuðsheitum arbeiða á samfelagsvísindaligum grundarlagi. Aðalfundurin tekur avgerð um broytingar í upptøkugrundarlagnum innan fyri karmarnar um endamál felagsins, smbr. § 2.*

[...]"

Er hetta kravið uppfylt, skal ein eisini sum minstakrav hava ein bachelor, ið liggur innan sáttmálaøkið hjá BLF. Sáttmálaøkið hjá BLF er greina í skjali 1 til sáttmálan millum BLF og FMR:

**SKJAL 1 - Ískoyti til sáttmálan**

*Fyrisitingarlig størv, ið eru umfatað av sáttmálanum*

Kandidatar, sum hava útbúgvingarnar, sum koma undir § 1, stk. 1 í sáttmálanum, eru:

1. Løgfrøðingar.

2. Búskaparfrøðingar, tvs. cand.polit., cand.oecon., cand.scient.pol., cand.rer.soc., cand.scient.adm., cand.scient.oecon., kand.samf., cand.techn.soc., cand.act., cand.adm.pol., cand.merc.aud., cand.negot.. við einari 4 ára ubúgving. Cand.scient.soc. og mag.scient.soc. - tó undantikið tær útbúgvingar sum mestan mun viðvíkja antropologi ella etnografi.

3. Cand.merc. greinir.

4. Cand.comm. við samfelagsvísindaligum "overbygningsfag", ið ikki eru studentaskúlafak.

5. Handilsløgfrøðingar, cand.merc.jur.

6. BA og diplom útbúgvingar til punktini 1-5. Harumframt HA og HD annan part, har tann setti er í einum starvi, sum náturliga er eitt BLF-starv.

7. Aðrar útbúgvingar sum kunnu javnsetast við omanfyri nevndu útbúgvingar. Her verður serliga hugsað um MBA útbúgvingar[1] frá útlendskum læristovni.

Í ávísum førum er tað gjørligt, at sleppa inn á ein kandidat ella master, sum liggur innan sáttmálaøkið hjá BLF, uttan fyrst at hava ein akademiskan bachelor, sum liggur innan sáttmálaøkið hjá BLF. Men fyri at gerast limur í BLF krevst, at ein sum minstakrav hevur ein akademiskan bachelor innan sáttmálaøkið hjá BLF. Tískil kunnu persónar, sum ikki hava ein akademiskan bachelor innan sáttmálaøkið hjá BLF, ikki gerast limir í BLF. Heldur ikki um teir hava ein kandidat ella master, sum liggur innan sáttmálaøkið hjá BLF.

Somuleiðis er heldur ikki gjørligt at leggja ECTS stig saman frá ymsum útbúgvingum. Um ein hevur tikið 90 ECTS stig á bachelor stigi í einum faki, og so 90 ECTS stig í einum øðrum faki, er ikki gjørligt at leggja hesi ECTS stig saman, og harvið fáa 180 ECTS stig, sum ein vanligur akademiskan bachelor er. Heldur ikki er gjørligt at flyta ECTS stig frá einum kandidati ella master, niður til ein bachelor. BLF tekur bert hædd fyri útbúgvingum sum er endaliga lidnar, so tískil ber ikki til at leggja útbúgvingar ella ECTS stig saman.

Havi tit spurningar um limatreytirnar hjá BLF, so skrivi til okkum á: blf@blf.fo.

[1]MBA útbúgvingar eru at meta sum 1-ára kandidatar.